### Jákup á Sundi:

# Fiskimaður og útróðrarmaður

**Vit hava hitt tann 85 ára gamla Jákup Reinert, vanliga kallaður Jákup á Sundi. Hansara søga er áhugaverd. Lutvíst kann hann greiða okkum frá, hvussu tað var at vaksa upp á Sundi, har tað bert vóru tvey hús. Men Jakku hevur eisini eins og pápin, Gustav, og beiggin, Gimmi, verið ein kendur útróðrarmaður, og er hann framvegis er á floti, tá tað liggur fyri. Men hann hevur so vissuliga eisini verið skipsmaður í sínum ungu døgum, eisini undir krígnum. Tí er hansara frásøgn eitt gott íkast til okkara bygda- og fiskimannasøgu. Norðradalur og Sund eru nógv tengd saman. Tað sama er við Kaldbak. Tá arbeitt verður við slíkum frásøgum verður ofta komið fram á aðrar søgur. Tað er eisini galdandi her. Tí kann sigast, at henda røðin eisini er søgubrot hjá hesum trimum bygdum. Hetta er fyrsti av fimm pørtum.**



*Jakku, kendur útróðrarmaður, og kona hansara, Alvilda, ættað úr Sørvági.*



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Fyrst skal eg greiða eitt sindur frá míni ætt í Norðradali. Langabbi mín var Óli Johannesen f. 1830 úr Gortri við Gjógv. Hann vaks upp í Kvívík, men gjørdist seinni húskallur í Kaldbak. Hann giftist 1854 í Kaldbak við Angeliku Inger Margrethe Reinert av Á, f. 1829, í Kaldbak. Óli gjørdist uppsitari á prestagarði í Norðradali og tók seinni við garðinum.

Í hjúnarlagnum vóru fimm børn, sum fingu eftirnavnið Reinert eftir mammuni.

Eitt av børnunum var abbi mín Andrias, f. 1855, sum tók garðin eftir pápan. Systkini hjá honum vóru Inga, Olevina, Kornelius og Charlotta, vanliga nevnd gumma. Omma var Johanna Maria Djurhuus f. 1858 úr Skopun. Omma og abbi giftust í 1884.

Pápi mín var Gustav Reinert. Systkini hjá honum vóru Jens, Óli, Nordina, sum búði í Noreg, Andrea, fór til Danmarkar og doyði nokk so ung, Sanna, og Jana, sum var gift í Skopun.

Pápi flutti fyrst til Havnar, har hann saman við beiggja sínum, Jens, hevði matstovu, har Frelsunarherinum nú er. Mamma mín æt Elsebeth Helena, og hon var av Viðareiði. Tá tey flyta til Havnar vóru tey nýgift og elsti beiggi mín Gimmi var føddur í Havn. Vit vóru seks systkin, tríggir dreingir og tríggjar gentur. Míni systkin eru: Arngrim, kallaður Gimmi, giftur við Agnas Vang úr Kaldbak, Andreas, Hjørdis, gift við Lars Christiansen úr Sumba, Gunhild, kallað Gugga, sum var gift við Kjartan Jacobsen í Kaldbak, og Solveig, sum var gift við Jógvan Samuelsen í Havn. Bert systrarnar liva eftir.

Andreas doyði 13 ára gamal av tuberklum. Hann varð saman við øðrum í húsinum smittaður av einum vitjandi. Andrias gjørdist so ringur, at lívið ikki stóð til at bjarga.

### Hvussu Apol navnið kom til Føroya

Matstovuvirksemið gekk ikki so væl. Tørvurin á matstovum var nokk ikki tann sami sum í dag! Matstovan fekk tó eina varandi ávirkan. Hon er orsøkin til, at Apolnavnið er í Føroyum og er hetta ein áhugaverd søga.

Umleið 1918-19 kemur eitt hollendskt skip við eini saltlast á redina í Havn. Nakrir av manningini fara við einum báti í land. Ein av teimum var stýrimaðurin Louis Apol. Men tá teir ætlaði sær at rógva umborð aftur, brast hann á við landsynningi, og tað var ómøguligt at rógva umborð. Hvat var so at gera, uttan at søkja sær lívd, har hon fanst? Louis dugdi eitt sindur av donskum og kundi spyrja seg fyri. Hann varð vístur inni á Reinerts Kafé. Her hitti Louis fastur mína Sannu. Louis fór avstað aftur í fyrsta umfari, og hann lovar at koma aftur. Tí trúi Sanna nú ikki rættiliga! Men ein dag kemur Louis aftur, og tey giftast. Tey fluttu fyrst til Hollands, har Eiko var føddur. Men Sanna treivst ikki í slættlendinum í Hollandi, og tey fluttu aftur til Føroyar. Fyrst búgva tey í Havn. Síðan flyta tey Norðradals. Eiko greiðir frá, hvussu væl honum dámdi at koma til Sund at vitja mammubeiggjan. Hann var nakað javngamal við Gimma og Jakku. Tað var ein stórur munur á Norðradal og Sund, og hesin var at á Sundi slapst á flot, tí tað var kyrrupláss, meðan tað sjáldan var atleggjandi í Norðradali. Teir plagdu at fara út frá við snøri ella at seta sílagørn og tílíkt, sum dámar smádreingjum.

Sanna og Louis fingu tvey børn afturat, og vóru tey Jóhanna og Jákup. Tey fluttu síðan Skopunar, og eftir nøkur ár aftur til Havnar.

Louis var ein fjølbroyttur maður. Fyrstu árini sigldi hann sum stýrimaður úti í heimi, men hevði eisini virksemi av ymiskum slag. Millum annað var hann millummaður, tá Silver Spray kom til Føroya.

Áðrenn FF-blaðið varð niðurlagt, hevði tað eina áhugaverda frásøgn um føroyingar, sum vóru á stórhvalaveiðu í Suðuríshavinim aftaná kríggið. Tá var tað Louis sum var umboðsmaður í Føroyum. Seinni gjørdist hann stjóri á Landshandlinum.

Eftirkomarar hjá Sannu og Louis hava eisini gjørt seg galdandi í Føroyum á ymiskum økjum sum við byggivirksemi og telving.

### Fluttu inn á Sund

Hetta var søgan um matstovuna. Annars hittust Óli pápabeiggi og kona hansara Josefina eisini har.

Vit fluttu síðan inn á Sund, har pápi fekk sær hønsagarð. Hann hevði einar 500 hønur, men tað gekk heldur ikki nóg væl. Fólk